# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Dupultmoralur

Spurningurin um vestlendska luttøku í olympisku leikunum í Kina hevur sett djúpar gjáir í vesturlendsku samfeløgini. Ósemjan snýr seg um, hvørt vesturlendsku fólkaræðini skulu verða umboðað á hægsta stigi, tá leikirnir í Beijing verða settir seinni í ár. Orsøkin er sjálvsagt mannarættindastøðan í Kina sum heild og serstakliga harðrenda viðferðin, sum tibetansku andstøðuni hevur verið fyri. Ósemjan er stór, fleiri demokratisk stórveldi hava boðað frá, at tey ikki verða umboðað við setanarhátíðarhaldið, og trýst verður lagt á Kina um at taka upp ein dialog við tibetansku andstøðuna. Desmond Tutu hevur alment heitt á allar demokratiskar stjórnarleiðarar um at halda seg burtur. Amnesty International heldur hinvegin, at hesir leiðarar eiga at fara til Beijing og har nýta høvi at tala fyri mannarættindinum. Hetta er ikki lætt – ei undur í, at mong eru ørkymlað og hava trupult við at taka støðu. Til hesi ivandi er danska stjórnin, sum sigur eitt í dag – eitt annað í morgin.

Mannarættindini í Kina eru í fokus í hesum døgum. Víst verður á framstig, eitt nú hetta, at allir deyðadómar skulu roynast í hægstarætti, nakað, sum hevur minkað talið á avrættingum við 16%, men Kina hevur tó framvegis eitt syndarligt heimsmet á økinum. Her er ikki sørt av dupultmorali uppií eisini. Kina hevur havt ómetaligan búskaparvøkstur síðan kommunistiski flokkurin umskipaði búskapin. Í hesum sambandi hava tær stóru multinationalu fyritøkurnar gjørt sær dælt av bíligu arbeiðsmegini í Kina. Alt størri partar av ídnaðarfyritøkunum verða fluttar til Kina, har milliónir av arbeiðsfólki virka bíligar ídnaðarvørur til vesturlendska marknaðin. Hesi arbeiðsfólk eru ikki bert illa lønt, tey eru eisini uttan tey mest grundleggjandi mannarættindi. Tey eru sonenevndir migrantarbeiðarar, sum ferðast millum heimbygd og stórbý og eru uttan nakað slag av sosialari ella arbeiðsrættarligari trygd. Tað eru serstakliga kvinnurnar, sum eru illa fyri, samstundis sum tær eru nógv eftirspurd arbeiðsmegi hjá teimum multinationalu. Millum hesar stórfyritøkur teljast eisini fleiri norðurlendskar fyritøkur, sum soleiðis eru við til at misnýta láglønarbólkarnar í Kina, alt meðan arbeiðsplássini hvørva úr heimlondunum.

Norðurlendsku fakfelagsrørslurnar hava víst á hesi viðurskifti, og rørslurnar eru virknar í Kina á mongum økjum. Spurningurin um luttøku í olympiska hátíðarhaldinum er tí ein spurningur, sum ikki er lættur at takla, tí her hongur nógv uppií. Spurningurin er, um ikki AI hevur grein í sínum máli, tá sagt verður, at fólkaræðini og demokratisku støreveldini eiga at nýta høvið til samtalu, sannføring, upplýsing og yvirtaling. Samstundis kundu tey tikið í nakkan á teimum multinationalu og við heimligari lóggávu noytt tey at halda mannarættindi í teirra fyritøkum í Kina.

**Sosialurin**

## Hjartasuff í samband við narkomálið

JOHN V. PETERSEN

Teir seinastu dagarnar hevur nógv verið at hoyrt og lisið um narkomálið. Eitt sum serliga hevur verið at hoyrt um, er at tað er so synd at hesin ungi maður skal vera avbyrgdur frá øllum, og at familja hansara er bangin um at hetta fer at ávirka hann sálarliga.

Ja tað er synd, synd í mammu hansara, at hon skal hava so nógva sorg av at, sonur hennara hevur oyðilagt sær lívið og spilt øll hesi góðu ár burtur. Tí hvør mamma vil sínum barni so ilt?

Í øllum okkara gerandistrummirummi hoyra vit hesi tíðindi og hugsa nokk, at tað er kanska synd í hesum manni, og so hugsa vit kanska ikki meir um tað, hugsa ikki um allar menniskjalagnur sum verða lagdar í sor av hesum ræðuliga rúsevni.

Ja, tær eru nógvar.

Tað byrjaði kanska so óskyldugt við einari tablett, men áðrenn unga gentan veit av, er hon blivin bundin av hesum rúsevni, og so gongur alt út upp á at skaffa rúsevnir, og tað eru ikki smápengar sum skulu til. Og meir tað vindur upp á seg, meira nøgd skal til, og fleiri pengar skulu til. Í tíðini har gentan blívur meir og meir bundin av rúsevnum, so oyðileggur hon ikki bara seg sjálva men eisini alla sína familju, tey sum eru góð við hana og vilja henni tað besta. Tann mamman, sum gav henni lív, sær hvussu hennara elskuliga dóttur niðurbrýtur sín kropp og oyðileggur sítt lív.

At enda er hon so desperat at skaffa pengar til rúsevnini, at hon byrjar at lúgva og stjala frá familjuni. Og tá tað ikki er nokk, ja so flytur hon til Danmarkar, har hon kann ganga á gøtuni og selja sín kropp fyri at skaffa rúsevni. Og um tað er gongdin, ja so er ikki long tíð, til hon ein dag verður funnin



inni á einum skitnum almennum wc, við einari nál í arminum, deyð av yvirdosis.

Er tað ikki synd í hennara foreldrum? Tey stríddust við at fáa hana at koma til fornuft, stríddust við at fáa hana avrúsaða, stríddust alt tað tey kundu, gjørdu alt fyri at fáa tað dýrabarasta tey áttu aftur, men onki nyttaði, RÚSEVNISDJEVULIN hevði fingið sítt tak í hana, og hon kláraði ikki at sleppa undan, hví? Tí at eitt stuttligt leygarkvøld kom ein ungur sjarmerandi maður og bjóðaði henni eina “óskylduga” tablett.

Hugsið tykkum til, hvussu nógv hendan øgiliga mongdin av rúsevnum, ið bleiv smuglað, kann oyðileggja. Nei, vit mugu ikki gloyma hvørjum tað veruliga er synd í.

## Aftursvar til greinina »Teir stóru eta teir smáu«

HANS PAULI J. HENTZE

“Teir stóru eta teir smáu” var yvirskriftin á einari grein í fríggjadagsbløðunum, skrivað av heimasandsmanninum Sólvit Simonsen. Her rør hann uppundir, at leikaraúrvalið heiman á Sandi og í Havnini ikki eru heilt tey somu, og tað skal eg geva honum rætt.

Sólvit nevnir somuleiðis, at B71, sum á landsplan er eitt smátt fótbóltfelag, endiliga hevur ein dugnaligan leikara, sum felagið sjávlt hevur ælt. Men nú hendir tað, at hesin leikarin fær boðið ein møguleika at spæla við B36, sum er eitt av teim stóru feløgunum, og hvørs leikarapotentialið er nógv størri og betri.

Ikki bara hevur B36 betri leikarapotential enn B71, B36 hevur eisini betri fíggjarligar møguleikar enn B71, og hevur tí eisini betri møguleikar enn liðið av Sandoynni.

Kanska sær Sólvit hugtungt á hetta málið, og tað skal hann hava loyvi til, men soleiðis sum eg síggi tað, so er sonevnda profesionellisman komin til Føroyar. Ikki tað, tað er nøkur ár síðan at profesionellisman fór at gera vart við seg í føroyskum ítrótti, og serliga í fótbóltinum.

Profesionellisman sleppa vit ikki undan, hvørki B36 ella B71. Tað virkar fyri mær, at henda profesionellisman ikki er fallin til allastaðni. Má eitt felag, um tað er B36 ella B71 er í prinsippinuim undirornað, yvirliva í fótbóltinum í dag, so mugu pengar á borðið, og teir bestu fara har teir fáa góðar møguleikar at spæla. Sum bretin einaferð segði: That´s the name of the game.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.